# AĐALSKRIVARI TIL AMNESTY INTERNATIONAL FØROYAR

## Starvs- og persónsprofilur

OKTOBUR 2021

# INNIHALDSYVIRLIT

INNGANGUR....................................................................................................3
UM AMNESTY INTERNATIONAL....................................................................................................3
ÓHEFTNI....................................................................................................3
STRATEGISKU MÁLINI....................................................................................................4
AMNESTY INTERNATIONAL FØROYAR HEVUR TRÝ HØVUÐSMÁL....................................................................................................4
UM STARVIÐ SUM AÐALSKRIVARI....................................................................................................5
FØRLEIKAKRØV OG EGINLEIKAR....................................................................................................5
VIT BJÓÐA....................................................................................................5
LØN OG SETANARTREYTIR....................................................................................................5
SETANARTILGONGD....................................................................................................6
UMSÓKN....................................................................................................6
SAMBAND OG UPPLÝSINGAR....................................................................................................6

## INNGANGUR

Í hesum starvs- og persónsprofilinum greiða vit fyrst stutt frá Amnesty International sum mannarættindafelagsskapi. Síðan lýsa vit starvið, uppgávurnar og ábyrgdina hjá aðalskrivaranum umframt teir fakligu førleikarnar og persónligu eginleikarnar, sum tann nýggi aðalskrivarin skal hava. Vit greiða frá, hvat Amnesty hevur at bjóða, umframt lønini og setanartreytunum. At enda greiða vit frá setanartilgongdini, og hvussu tú fært samband við okkum.

## UM AMNESTY INTERNATIONAL

Amnesty byrjaði í 1961 sum ein rørsla, sum hevði til endamáls at fáa fangar, sum av órøttum vóru fongslaðir, leyslatnar. Amnesty hevur síðan vaksið seg til heimsins størsta mannarættindafelagsskap. Í fyrstuni arbeiddu vit bara fyri at fáa fangar leyslatnar, men nú arbeiða vit við støði í allari ST-heimsyvirlýsingini um mannarættindi. Vit arbeiða sostatt fyri at basa mannarættindabrotum av øllum slag.

Arbeiðið er víðfevnt. Sum dømi kunnu vit nevna, at vit arbeiða fyri at verja og styrkja hvørt einstakt menniskja. Vit arbeiða fyri, at fólk frítt skulu kunnu siga sína hugsan og trúgva tað, sum tey vilja. Vit arbeiða fyri at steðga mismuni og deyðarevsing. Vit vilja hava øll lond at verja kynslig rættindi og nøringarrættindi. Og vit arbeiða fyri, at rættindini hjá flóttafólki skulu verða vird.

Vit eru farin frá at hava eitt høvuðssæti í London til at hava stórar økismiðstøðir kring allan heimin, sum fáast við kanningararbeiði, átøk og samskifti. Soleiðis megna vit skjótari og betur at átala, mótmæla og virka ímóti mannarættindabrotum. Vit eru vorðin ein reystari rødd fyri frælsi og rættvísi.

## ÓHEFTNI

Amnesty International er politiskt og átrúnaðarliga óheft og óheft av øllum fíggjarligum áhugamálum. Tí eru limirnir lívsgrundarlagið og orsøkin til, at tað yvirhøvur er møguligt hjá okkum at virka í Føroyum.

## TRÝ HØVUÐSMÁL

Amnesty Føroyar er í løtuni skipað við tveimum ársverkum. Einum aðalskrivara, sum hevur ábyrgdina av at fremja altjóða og staðbundnu virksemisætlanina hjá felagsskapinum í verki, og einum samskipara, sum hevur ábyrgdina av limaviðurskiftum, fíggjarviðurskiftum og umsitingini av skrivstovuni.

Endamálið hjá føroysku deildini er:

1. at upplýsa um altjóða mannarættindi

2. at upplýsa um og ávirka mannarættindastøðuna úti í heimi

3. at upplýsa um og ávirka mannarættindastøðuna her heima

Vit arbeiða á ymsan hátt fyri at røkka málunum, t.d. við at leggja trýst á politikarar, skipa fyri kunnandi tiltøkum og átøkum, savna undirskriftir og eggja ungum til at vera við at skapa broytingar.

## STRATEGISKU MÁLINI

Amnesty International er ein altjóða felagsskapur, sum arbeiðir við felags málum í ásett áramál. Ætlanin fyri 2022-2029, sum júst er samtykt, ásetur evnini, sum vit arbeiða við tey næstu árini, og hvussu vit arbeiða í Amnesty. Evnini, sum vit fara at leggja serligan dent á, eru talu- og skrivifrælsi og javnrættindi. Vit halda tó eisini fram við evnunum, sum vit longu arbeiða við.

Tær ymsu deildirnar arbeiða við bæði altjóða og staðbundnum málum og gera sjálvar av, júst hvussu tær arbeiða við málunum. Nevndin ger av, hvørjum evnum vit arbeiða við, men ger tað í samráð við aðalskrivaran.

Í løtuni arbeiða vit við fleiri afturvendandi tiltøkum og átøkum umframt ávísum málum.

Tey afturvendandi tiltøkini og átøkini eru m.a.:

- samtykki (hvørt summar skipa vit í samstarvi við Fólkaheilsuráðið, politiið og Sig Frá fyri einum átaki)
- fólkamorð (á altjóða holocaustdegnum skipa vit í samstarvi við Nám fyri einum tiltaki fyri fólkaskúlanæmingar)
- Skriva fyri lívi (vit skiva til og fyri fólki, sum er fyri mannarættindabrotum)
- framløgur og skeið (vit skipa sjálv fyri skeiðum og fáa eisini nógvar fyrispurningar um at hava framløgur)
- Femifagnaður (hvørt ár eru vit við til at skipa fyri Femifagnaði)

Nøkur av málunum, sum vit arbeiða við í løtuni, eru:

- fongsulsviðurskifti
- samtykkislóggáva
- umstøður viðvíkjandi neyðtøku

Rasisma og veðurlagsbroytingar eru evni, sum vit fara at taka upp fyrst í 2022.

## UM STARVIÐ SUM AÐALSKRIVARI

Aðalskrivarin hjá Amnesty International Føroyum hevur evstu ábyrgdina av virkseminum og starvsfólkunum hjá felagsskapinum. Tað er uppgávan hjá aðalskrivaranum at fremja altjóða virkisætlanina hjá Amnesty International og málini, sum nevndin og skrivstovan seta sær fyri at røkka. Hetta verður gjørt í tøttum samráð við nevndina og altjóða skrivstovuna.

Í 2022 fer Amnesty International at seta ta nýggju altjóða ætlanina í verk, og nýggi aðalskrivarin fer at standa á odda fyri hesum arbeiðinum.

Aðalskrivarin hevur eisini ábyrgdina av at skipa fyri og samskipa átøk og tiltøk, sum nevndin setur út í kortið. Tað mesta av virkseminum hjá Amnesty fer fram í samstarvi við onnur feløg og stovnar. Aðalskrivarin er almenna andlitið hjá Amnesty, og tí fevnir starvið í stóran mun um fjølmiðlaarbeiði og upplýsandi arbeiði mótvegis felagsskapum, stovnum, ráðum, skúlum o.ø. Starvið fevnir eisini um nakað av undirvísing og upplýsing um mannarættindi umframt lobbyvirksemi og miðlaluttøku.

## FØRLEIKAKRØV OG EGINLEIKAR

Aðalskrivarin skal

- hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni ella tilsamans samsvarandi útbúgving og royndir,
- megna at samskifta greitt og væl á føroyskum og enskum og ikki smæðast miðlar og at tala søkina hjá Amnesty International,
- duga at hugsa politiskt strategiskt og vera diplomatiskur,
- vera álitisvekjandi, sakligur og semjusøkjandi,
- hava áræði og dirvi at ganga á odda og rópa hart umframt at leiða nevnd og aktivistar fram ímóti málinum,
- vera áhaldin, hóast onnur steðga, tí at broytingar kunnu taka drúgva tíð,
- og megna at hava fleiri bóltar í luftini í senn.

## VIT BJÓÐA

Vit bjóða tær eitt fjølbroytt og meiningsgevandi starv, har tú ert við til at seta dagsskránna og betra um mannarættindastøðuna úti í heimi og heima í Føroyum. Uppgávurnar eru mangar og ymiskar, og stundum er arbeiðið krevjandi. Tú ert við á nevndarfundum, sum verða hildnir um kvøldarnar, og onkuntíð eru tiltøk og miðlaluttøka uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

## LØN OG SETANARTREYTIR

Starvið er 40 tímar um vikuna. Lønin og setanartreytirnar eru samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum.

## SETANARTILGONGD

Ein setanarnevnd velur umsøkjarar út til samrøðu. Tvey samrøðuumfør verða. Tað fyrra fer fram á føroyskum og tað seinna á annaðhvørt donskum ella enskum. Tey, sum verða boðin til samrøðu, kunnu verða biðin um at taka eina roynd við denti á persónmensku við atliti at arbeiðslag. Ein ráðgevingarfyritøka stendur fyri royndini. Umsøkjararnir fáa høvi at meta um royndarúrslitini saman við ráðgevingarfyritøkuni, áðrenn úrslitini verða brúkt sum grundarlag undir samrøðuni.

Setanarbólkurin metir um umsøkjararnar og leggur tilmæli fyri nevndina, sum setur starvið. Grundarlagið undir tilmælinum er umsóknin, úrslitið og viðgerðin av royndini, samrøðan og persónliga medferðin undir samrøðuni.

## UMSÓKN

Umsóknir til starvið skula vera Amnesty í hendi í seinasta lagi **8. novembur 2021 kl. 12**.

Umsóknir, CV og onnur viðkomandi skjøl skula sendast

Amnesty International Føroyar
J.H. Schrøtersgøta 7
100  Tórshavn

ella við telduposti til starv@amnesty.fo

Viðmerk "Aðalskrivari til Amnesty International Føroyar".

## SAMBAND OG UPPLÝSINGAR

Áhugaðir umsøkjarar, sum vilja vita meira um starvið, kunnu seta seg í samband við Regin Berg, virkandi formann, á tlf. 581013 ella reginberg@gmail.com.

Vit vísa eisini til heimasíðuna www.amnesty.fo, har nógvar viðkomandi upplýsingar eru at finna.